## Óttast afturgongd

Amerikanski Miðbankin sigur í seinastu frágreiðing sínari, at teir óttast eina niðurgongd í amerikanska búskapinum. Ein niðurtúr, sum væl kann gerast bæði drúgvur og djúpur. Í frágreiðingini verður sagt, at pengapolitisku amboðini, sum fyribils eru tikin í nýtslu, ikki eru nóg sterk til at steðga fallinum í búskapinum. Johnny Jacobsen, sum er greinari fyri Nordea, sigur við EPN, at frágreiðing gevur til kennar, at talan helst verður um enn eina rentulækking frá amerikanska Miðbankanum. Síðani ársskiftið er amerikanska rentan lækkað 2 prosentstig og er í dag 2,25%.



## Shell skipar fyri Heilsurenning

Heilsurenningin hjá Shell, sum vegna vánaligt ikki bleiv av nøkrum seinasta vikuskiftið, verður nú leygardagin kl. 16. Tiltakið er ætlað øllum fólkum, eisini teimum sum bara hava hug at ganga teinin. Tað er í samstarvi við Treysti, Bragdi og Roysni at Shell skipar fyri tiltakinum. Hesaferð verður runnið á Shellstøðini í Klaksvík, Gøtudali og Ringvegnum í Havn. Runnir verða tveir teinar, ein uppá 3 km og ein uppá 5 km. Gentur og dreingir kunnu bert renna tann styttra teinin, meðan tey vaksnu kunnu velja styttra ella longra teinin.

# Góð ting taka tíð



**Millum væl lærdar áhoyrarar og fyrilestrarhaldarar í Norðurlandahúsinum, var ein persónur, sum á mangan hátt var atypiskur fyri eina umhvørvisráðstevnu av slíkum slagi.**
**- Hetta við umhvørvinum hevur altíð havt mín stóra áhuga, sigur Kjartan Hansen, sum gongur í Studentaskúlanum í Hoydølum**

UMHVØRVI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

**Norðurlandahúsið:** – Øll kunnu gera nakað fyri umhvørvið, sigur ungi studentaskúlanæmingurin, sum gongur í 2. g.

Kjartan mundi helst vera yngsti luttakarin á umhvørvisráðstevnuni TACC 2008. Hetta forðaði honum kortini ikki í at trívast væl millum hinar lærdu luttakararnar í Norðurlandahúsinum.

Her fekk hann nógv nýtt og hent at vita um viðurskifti, sum hava hansara stóra áhuga.

Við áhugaverdu fyrilestrunum og øðrum sum fór fram á ráðstevnuni, hevur Kjartan fingið nógv at hugsa um.

- Hetta setti líkasum alt í perspektiv, sigur Kjartan Hansen við Sosialin.

Ráðstevnan endaði í gjár, og í morgun byrjar studentaskúladagurin aftur.

### Góð foreldur

Kjartan gongur sum nevnt í Hoydølum, og eitt av evnunum, sum hava hansara stóra áhuga er júst umhvørvið, og hvussu hin einstaki kann gera sítt til at hetta verður varðveitt.

- Eg havi altíð havt áhuga fyri veðurlagnum og hvussu hetta er broytt við tíðini, sigur hann engasjeraður við Sosialin.

Tá hann so frætti um hesa ráðstevnuna vakti hon beinanvegin hansara áhuga. Hann hevði sera góðan hug at fara, hóast prísurin eisini var í hægra lagi fyri ein næming í Hoydølum.

At so fyrrverandi amerikanski varaforsetin Al Gore eisini skuldi halda fyrilestur her, var ein møguleiki sum ein helst bert fær ta einu ferðina í lívinum.

Men hvat ger ein næmingur, sum fyri alt í verðini ynskir at sleppa á eina slíka ráðstevnu, tá prísurin fyri at luttaka nærkast teimum 7000 krónunum?

- Gott er at hava góð foreldur, kemur tað stillisliga frá honum.

### Tari tekur CO2

Hóast sín unga aldur, hevur hetta við umhvørvinum altíð ligið Kjartani nær.

Hann hevur lisið nógv um evnið, og hevur fylgt væl við í tímunum, tá hetta varð tikið uppá mál í undirvísingini.

Á ráðstevnuni fekk hann ein ótrúligan møguleika at sita undir liðini á teimum "stóru" monnunum og kvinnunum, og á teimum sum hava granskað í hesum í mong ár.



*- Tað var sera áhugavert at hoyra Al Gore, sigur Maria Gunnleivsdóttir Hansen*



*- Eg var heppin at sleppa á ráðstevnuna. Alt hetta við veðurlagi og umhvørvi hevur mín stóra áhuga, sigur Kjartan Hansen*